# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# 50 ára starvsdagur



Berint Johannesen, sum starvast sum maskinførari hjá Landsverki kundi 1. juli hátíðarhalda sín 50 ára starvsdag.

Hann fekk í hesum sambandi handað "Hendes Majestæts Dronningens fortjenstmedalje i sølv".

1. juli hevði Berint Johannesen 50 ára starvsdag, og í hesum sambandi var leiðslan á Landsverki, nærmastu starvsfelagir og nærmasta familjan hjá Berint innboðin til hátíðarhald í kantinuni á Landsverki týskvøldið 7. juli.

Hetta er fyrstu ferð stovnurin kann hátíðarhalda 50 ára starvsdag, og er hetta sjálvandi sera stórur dagur bæði fyri Berint, men eisini fyri Landsverk, sum 1. apríl í fjør rundaði 60 ár.

Torkil Olsen, leiðari á framleiðsludeildini, bar fram røðu og ynskti Berint hjartaliga tillukku við starvsdegnum. Eisini handaði hann Berint eina gávu og blómutyssi frá stovninum, umframt "Hendes Majestæts Dronningens fortjenstmedalje i sølv" og tilhoyrandi heiðursbræv fyri drúgva tænastu.

Berint byrjaði í starvi hjá Landsverki, tá Landsverkfrøðingurin, tann 1. juli 1959. Berint var tá einans 18 ára gamal. Hetta var annars tíðin, tá ið stórar broytingar vóru í fiskivinnuni. Tey nýggju línuskipini byrjaðu tá at koma til Føroya og flestu ungir menn fóru til skips við hesum nýggju skipum. Hóast hesa gongd millum aðrar unglingar, so valdi Berint longu tá sítt lívsstarv hjá Landsverki.

Fyrsta arbeiðið, hann var við at gera, var vegurin til Nato-støðina í Mjørkadali. Fram til miðskeiðis í 70-árunum starvast Berint sum maskinførari við vegarbeiði, og var við til vegagerðina millum Havnina og Norðstreym, og Hósvík og Tjørnuvík. Eftir tað hevur Berint starvast í Hundsarabotni sum maskinførari.

Í sínari takkarrøðu fortaldi Berint um arbeiði hjá sær á Landsverki. Millum annað tosaði hann um tíðina, tá ið hann arbeiddi í kavaruddingini. Tá koyrdu teir maskinur uttan førarahús, og tað var ikki tespiligt at fara út at rudda kava í slíkum maskinum.

**www.lv.fo**

---

# Eivind av Reyni 60 ár




Sunnudagin 12. juli fyllir Eivind av Reyni í Havn 60 ár. Hann er havnarmaður og millum manna kendur sum ánari og stjóri á Reyni Service.

Eivind vaks upp niðri í Rættará. Foreldrini vóru Josefina, f. Thomsen úr Skemmuni í Porkeri, ella Fina, sum hon varð nevnd, og Sigird av Reyni, ið var ættaður av Ingutrøð í Havn.

Fina og Sigird fingu fimm børn: Janus, Jóann, Christina (1947-1986), Eivind og Anna. Fina og Sigird búðu niðri undir krígnum, og Janus og Jóann vórðu føddir, áðrenn familjan flutti aftur til Føroya. Systkini búgva øll í høvuðsstaðnum.

Sigird fór longu í 1947 undir at arbeiða upp á bilar og at selja bilar, samstundis sum hann hevði el-installatørvirki í Rættará. Sigird umboðaði eitt nú ensku Morris bilarnar hjá British Motor Company.

Kanska var tað upplagt, at yngsti sonurin skuldi ganga í faðirsins fótasporum. Men í staðin fyri at fara í læru hjá pápanum, so fór Eivind í læru sum bilmekanikari hjá Frits Jensen, sum hevði verkstað og bilasølu í Gundadali.

Eivind varð avlærdur í 1969, og tá fór hann at arbeiða saman við pápanum. Hann var altso 20 ára gamalur, tá ið hann fór at selja bilar, og Eivind hevur selt bilar í fjøruti ár.

Eivind yvirtók eftir pápan, sum arbeiddi saman við og stuðlaði so leingi, sum hann livdi.

Í 1978 flutti Reyni Service úr Rættará og í nýggjan virkisbygning í Hoyvík. Í sær sjálvum var tað stórt frambrot, men serliga stór gjørdust menningin og vøksturin, eftir at Reyni Service í 1980 fór at umboða Toyota bilarnar.

Lyklaorðið hjá Eivindi og Reyni Service hevur verið tænastustøðið. Karmarnir eru vaksnir og víðkaðir fleiri ferðir, og Reyni Service er kent fyri at hava fremstu og bestu amboðini og fyri at hava starvslið, sum er væl inni í tí, sum tey fáast við.

2005 var hendingarríkt hjá Eivindi og Reyni Service. Árið fyri at undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar varð tikin í nýtslu, vórðu nýggja verkstaðið og bilsølan við tunnilsmunnan í Borðoyavík tikin í nýtslu, og hetta sama árið keypti Eivind alt bilvirksemið og verkstaðsbygningin hjá P/F Meinhardt Arge við Oyggjarvegin. Eftir yvirtøkuna broytti Eivind navnið soleiðis, at Auto Service, sum var gamla navnið, kom aftur til heiður og æru.

Eivindi giftist í 1975 við Sigrun, f. Lamhauge, og ættað úr Havn. Børnini hjá teimum eru Leif, Sigrid, Sámal og Christina. Eivind eigur seks abbabørn, og eitt er á veg.

Sigrun og Eivind hava øll árini verið í felag um Reyni Service. Eitt skifti í 90-unum var Sigrun stjóri á Reyni Service. Eyðkennið fyri tey bæði er, at tey duga væl at fara við fólki, eru trúføst, og at tey eru gestablíð.

Fina og Sigird vóru trúføst í Ebenezer, og Eivind gekk í foreldranna fótasporum í samkomuni. Í nógv ár var hann sunnudagsskúlalærari, og so hevði hann saman við øðrum ábyrgd fyri fleiri øðrum tænastum.

Seinastu árini hevur Eivind verið partur av samkomuni í Marknagili.

Sigrun og Eivind hava serligan tokka til Hetland, har tey hava ferðast nærum á hvørjum ári síðani fyrst í 80-unum. Tey eiga nógvar vinir í samkomuni har niðri, og tey hava verið góðir stuðlar í barnalegunum, sum tað varð farið undir í 1994.

60 ára føðingardagurin verður hildin í nýggju hølunum á Reyni Service í Hoyvík sunnudagin 12. juli frá kl 12.00 til 17.00, har øll eru vælkomin.

*-red*

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Gunnar Helgi Dam, Klaksvík**, andaðist í heiminum mikudagin, 63 ára gamal.

**Ingi Mohr** fer til gravar úr Ebenezer leygardagin kl. 14.

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara góða systir, mostir, fastir, svigarinna, ommu og abbasysti

**Jóhanna Maria Gaard**
vanliga nevnd Mia,
ættað úr Oyndafirði

andaðist og varð jarðað
Tøkk til Henning Bøgesvang prest fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til Símun fyri góð orð í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og gravara.
Stóra tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Eysturoyar Ellis- og røktarheim.
Eina stóra tøkk til starvsfólkini á Eysturoyar Ellis- og røktarheimi, at tit vóru so góð við hana, ta tíðina hon kom at búgva har.
Eisini vilja vit takka øllum, sum hava verið so góð við Miu. Familjan, bygdarfólk, tit á Frítíðarheiminum og Dáanum.
Tøkk fyri alla hjálp til jarðarferðina.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jóna, Hansa og Heini**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæra móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Laurensa Maria Nielsen**
Strendur

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Bøgesvang, prest, fyri góð og vøkur orð á ellisheimi og í kirkju.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og gravara.
Tøkk fyri bakstur og hjálp við ervinum.
Tøkk fyri peningagávur til Ellis- og røktarheimið og tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Niels Jacob Thormund Nielsen**